Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 25. august 2006



## Napoleon og Josefina: Ein kærleikssøga 1:3
Eftir fronsku kollveltingina verður tann ungi offiserurin Napoleon Bonaparte boðsendur til París fyri at fáa tamarhald á einum uppreistri innan tað kongaliga. Hann klárar seg væl á vígvøllum og verður útnevndur til herovasta. Men tá ið Napoleon verður forelskaður í tí vøkru einkjuni Josephine de Beauharnais, fær ungi herførarin sína higartil størstu avbjóðing. Klárar hann at vinna Josephinusa hjarta?

**Fríggjadag 25. kl. 20.55**



## Vísindi: Rúmdarklistur
Tá vit hyggja út í rúmdina, síggja vit bara ein sættapart av øllum tí, har er. Alt hitt er myrkt næstan ósjónligt tilfar.Tað hevur altíð verið har, og tað er við til at halda stjørnuskipanunum uppi. Tyngdarmátturin frá hesum dimma tilfarinum er eitt slag av rúmdarklistri og hevur alt at siga í rúmdarsøguni.Í sendingini fara tey eina ferð út í rúmdardimmið. Sendirøðin Vísindi er aftur á skránni í nýggjum hami og við nýggja vertinum, Ann Marker.

**Týsdag 29. kl. 20.15**



## Frozen Land
CANAL+ FILM1

Frumsýning: Nógv rósti finski leikstjórin Aku Louhimies gevur hyggjaranum innlit í lægsta partin av samfelagnum við eini søgu um ein 500-evroseðil. Hesin pengaseðilin fer frá eigara til eigara og letur ólukkuna liggja eftir seg. Frozen Land fekk Norðurlendska Filmsprísin í 2005. Finskt drama 2005.

**Mánadag 28. kl. 19.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**